Fíggjarmálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	16.09.2020
Mál nr.:	20/00393
Málsviðgjørt:	JEK
Eftirkannað:	02.09.2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Dagføring av skattafríu upphæddini til sjálvboðið arbeiði innan ítróttaøkið)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)
(Dagføring av skattafríu upphæddini til sjálvboðið arbeiði innan ítróttaøkið)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 101 frá 25. juni 2020, verður gjørd henda broyting:

Í § 29 b, stk. 1 verður "kr. 30.000" broytt til: "kr. 50.000".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Lógaruppskotið er gjørt, tí tað í samgonguskjalinum er ásett, at skattafría hámarkið til ítrótt skal broytast.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært galdandi lóggávu verður samsýning til dómarar, linjuverjar og venjarar innan ítróttin umframt leiðarar og hjálparar hjá ítróttafeløgum, ikki tald við í skattskyldugu inntøkuni, um samsýningin ikki fer upp um kr. 30.000 um árið.

Galdandi áseting er frá 1. januar 2013, og ítróttafeløgini hava tí víst á, at tørvur er á at dagføra upphæddina.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at dagføra galdandi upphædd, soleiðis at tað framhaldandi ber til at fáa skikkað fólk at taka lut í hesum sjálvbodna virksemi.

Landsstýrið ásannar samfelagsliga týdningin av tí stóra sjálvbodna arbeiði, sum verður gjørt innan ítróttaøkið. Talan er um dómarar, linjuverjar og venjarar innan ítróttin, umframt leiðarar og hjálparar hjá ítróttafeløgum.

Hesi fólk, sum brúka sína orku og frítíð til at leiða og venja okkara ungdóm, fáa eina ávísa samsýning frá sínum feløgum. Samsýningin samsvarar tó á ongan hátt við ta tíð og orku, hesi fólk nýta innan ítróttin.

Samsýningin skal tí lutvíst síggjast sum ein viðurkenning fyri arbeiðið og lutvíst sum eitt endurgjald fyri tær útreiðslur, hesi fólk sjálvi leggja í arbeiði teirra fyri ítróttin.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verður verandi satsur á kr. 30.000 árliga hækkaður upp í kr. 50.000 árliga.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá ÍSF.

Harumframt hevur uppskotið verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Føroya landsstýri.

Hoyringarsvar til uppskotið er komið frá ÍSF og Føroya Skótaráð.

ÍSF fegnast um, at skattafría upphæddin til sjálvboðið arbeiði innan ítróttaøkið verður dagførd.

ÍSF upplýsir, at uppskotið hevur verið til viðmerkingar hjá sambondunum í ÍSF, og at øll sambondini taka undir við uppskotinum, tó so at Fótbóltssamband Føroya hevði ynskt, at skipanin varð broytt til eina frádráttarskipan.

Fíggjarmálaráðið tekur hoyringarsvarið frá ÍSF til eftirtektar.

Við atliti at ynski hjá Fótbóltssambandi Føroya, metir Fíggjarmálaráðið, at ein skipan við einari skattafríari upphædd hóskar seg betur enn ein frádráttarskipan serliga havandi í huga, at upphæddirnar, sum verða latnar fyri sjálvboðið arbeiði, eru sera ymiskar og í miðal langt niðanfyri hámarkið, sbr. kapittul 2.1. Ein frádráttarskipan hevði tí borið í sær, at frádrátturin kundi verði nýttur til at lætta um skattin á øðrum inntøkum, og tað er ikki ætlanin við skipanini.

Føroya Skótaráð gleðist um, at politiska skipanin raðfestir dygdargott ungdómsarbeiði og skilir tað úrslit, ið spyrst burtur úr hesum arbeiði.

Føroya Skótaráð vísir á, at ein av grundsúlunum undir skótaarbeiðinum er sjálvboðið ólønt arbeiði, ið leiðarar og ungdómsleiðarar leggja eftir seg fyri at menna tann einstaka og felagsskapin. Ráðið ynskir framhaldandi, at sjálvboðið ólønt arbeiði skal vera bulurin í teirra arbeiði.

Víst verður á, hetta arbeiði til tíðir tó er so krevjandi, at um tey framhaldandi skulu kunna brúka skikkað fólk til at fyrireika og útinna partar av skótaarbeiðinum, er neyðugt at hesi fáa eina samsýning fyri teirra íkast og mista arbeiðstíð frá øðrum arbeiði.

Eisini verður víst á týdningin, sum skótaarbeiðið hevur fyri okkara ungdóm.

Ráðið sær tað sum ein skeivleika, at stuðulin til limirnar hjá ÍSF hækkar, meðan limirnir hjá skótunum ikki kunnu fáa henda stuðulin.

Fíggjarmálaráðið virðismetir arbeiðið hjá skótunum eins høgt og tað arbeiðið sum hjálparfólk gera innan ítróttin, men uppskotið snýr seg ikki um at veita feløgunum skattafrían stuðul, men harafturímóti um lutvíst at frítaka ta inntøku, sum hjálparfólk innan ítróttin fáa frá sínum felag, frá skatti.

Fíggjarmálaráðið er ikki vitandi um, at arbeiðið hjá skótunum verður lønt við eini samsýning, og verður tað tí sum er mett at vera rættast at avmarka uppskotið til hjálparfólk innan ítróttin.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Sambært teimum upplýsingum, sum Fíggjarálaráðið hevur fingið frá TAKS, vórðu kr. 8.170.330 rindaðar 843 persónum fyri sjálvboðið arbeiði innan ítróttaøkið í 2018.

Í miðal var upphæddin knappar kr. 9.700.

Av teimum 843 persónunum vóru tað bert 120 persónar, sum fingu eina upphædd á ímillum kr. 25.000 og kr. 30.000.

Um gingið verður út frá, at tað fyrst og fremst eru hesir 120 persónarnir, sum fáa hækkað sítt útgjald úr kr. 30.000 upp í kr. 50.000, verður økti kostnaðurin til sjálvboðið arbeiði innan ítróttaøkið kr. 2.400.000.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar eru fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingarnar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið fær ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri aðrar felagsskapir enn innan ítróttin.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, panting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið ber í sær ein skattalætta fyri tey, sum hjálpa til innan ítróttin.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Uppskotið hevur positivar avleiðingar fyri venjarar, dómarar og onnur hjálparfólk innan ítróttin, tí skattafría hámarkið hækkar úr 30.000 kr. til 50.000 kr.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við uppskotinum verður skattafría upphæddin til dómarar, linjuverjar og venjarar innan ítróttin, umframt leiðarar og hjálparar hjá ítróttafeløgum hækkað úr kr. 30.000 um árið upp í kr. 50.000 um árið.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 16. september 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá ÍSF
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Føroya Skótaráð